

STARVSLÝSING

# Vilt tú stýra ferðslutrygdini?

Ráðið fyri Ferðslutrygd søkir nýggjan stjóra at standa á odda fyri arbeiðinum hjá felagnum at skapa trygga ferðslu við støði í Nullhugsjónini.

**Umframt at hava**
- leiðaraevni
- samskiftisevni og
- samskipanarevni

**skal stjórin eisini**
- vera eldhugað/ur
- vera kreativ/ur
- geva seg av fullum huga til endamálið
- eiga evni til at gera hugskot til veruleika, og
- hava tev fyri eggjandi og upplýsandi átøkum

**Uppgávurnar hjá stjóranum eru m.a.**
- at vera íverksetari
- at vera verkætlanarleiðari, og leiða fleiri verkætlanir samstundis
- at savna og uppbyggja fakliga vitan til virkna nýtslu í samfelagnum
- at samstarva tætt við stuðlar, ið eisini eru tættir samstarvsfelagar hjá felagnum
- at samstarva við myndugleikar, skúlar, stovnar, feløg, fyritøkur og einstaklingar um at virka fyri at betra um ferðslutrygdina í Føroyum
- at luttaka í norðurlendskum ferðslutrygdarsamstarvi
- dagligt samskifti við ferðslubrúkarar
- at vera klár/ur at persónliga trína fram í almenna rúminum og umboða sjónarmiðini hjá RFF

**Førleikar**
Tú hevur hóskandi útbúgving, har leiðsla og samskifti eru nakrir av hornasteinunum.

Vit vænta, at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt, miðvíst, og at fyrihalda og tillaga teg til broytingar í starvinum. Tú kennir føroyska samfelagið væl, og hevur skil fyri hvat rørist millum fólk. Tú dugir væl við fólki og at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum.

**Løn**
Sambært nærri avtalu.

**Umsókn**
Hevur tú spurningar í samband við starvið, kanst tú seta teg í samband við starvsnevndarformannin, Kára Thorsteinsson (kt@rff.fo).

Umsóknarfreist er mánadagin 2. mai 2011. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

**Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til:**

Ráðið fyri Ferðslutrygd
Att: Starvsnevndin
Tungugøta 4 - Miðhæddin
Postsmoga 3209
110 Tórshavn

ella sum teldupostur til :rff@rff.fo

Ráðið fyri Ferðslutrygd

**Tungugøta 4 · Tórshavn · Tel 310 204 · www.rff.fo**

# Starvsfólk til bókhaldið á 62ºN



## Sóknast verður eftir starvsfólki til bókhaldið á skrivstovu okkara í Tórshavn.

**Arbeiði fevnir m.a. um:**
- Avstemman
- Skráseting
- Debitorstýring
- Kreditorstýring
- Lønarumsiting
- Annars alt vanligt skrivstovu- og bókhaldsarbeiði

**Førleikakrøv**
Vit vænta:
- at tú hevur skrivstovuútbúgving ella líknandi.
- at tú megnar at arbeiða sjálvstøðugt
- at tú dugir at samstarva
- at tú hevur kunnleika til bókhald
- at tú hevur kunnleika og royndir í Microsoft Office-forritunum
- at tú hevur góð evni at orða teg bæði skrivliga og munnliga
- at tú hevur góðan røkjuskap

Talan er um ¾ tíðarstarv, og lønin verður sambært avtalu. Afturat lønini verður knýtt ein eftirlønarskipan.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Per Aakjær á tlf. 233597 ella per@62n.fo

**Umsóknir skulu sendast til:**
62ºN
Hoydalsvegur 17
Postboks 3225
110 – Tórshavn

Ella við teldupostí til:
per@62n.fo
Umsóknarfreistin er
8. mai 2011

Virksemið hjá 62ºN fevnir um gistingarhús, ferðaskrivstovur, brennievni til flogfør, catering, incoming og bilútleigan.

Felagsnevnarin fyri alt virksemið er tænasta, og 62ºN er ein tænastufyritøka, sum setir kundan í miðdepilin.